# teimum lesandi



## Yrkistænastan
### – arbeiðstilboð til føroysk lesandi

**Í februar 2010 kemur ein nýggj skipan í gildi, sum skal binda føroyingar undir útbúgving og føroysku vinnuna saman. Skipanin verður umsitin av Stuðulsstovninum**

Slíkar skipanir, har lesandi fáa beinleiðis boð um størv, sum eru leys at søkja, hava leingi verið nýttar úti í heimi. Her heima kemur skipanin kanska serliga væl við nú, tá tað vísir seg at vera torført hjá nýútbúnum fólki at finna arbeiði. Yrkisskipanin kann lætta munandi um - bæði hjá teimum, ið ynskja at søkja starv, og hjá arbeiðsgevarum, ið ynskja at seta fólk við serligum førleikum.

Tey lesandi mugu tó sjálvi melda seg til skipanina. Tað skal gerast, tá tú søkir Stuðulsstovnin um stuðul. Á umsóknarblaðnum verður nevniliga spurt, um tú vilt vera við í skipanini og fáa starvslýsingar á tína privatu t-post adressu. Alt, ið krevst, er ein krossur í henda teigin. Síðani syrgir Stuðulsstovnurin fyri, at viðkomandi starvslýsingar verða sendar til tín, um okkurt viðkomandi starv verður leyst.

Skipanin virkar á tann hátt, at allir arbeiðsgevarar í Føroyum fáa í boðið at venda sær beinleiðis til tey, ið eru undir útbúgving. Tað verður gjørt soleiðis, at bræv verður sent øllum arbeiðsgevarum fyrstu vikuna í februar 2010. Brævið verður sent til privatar arbeiðsgevarar og til almennar arbeiðsgevarar, har ímillum eisini kommunurnar umvegis kommunufeløgini. Í brævinum fáa arbeiðsgevararnir tilboð um at nýta skipanina. Skipanin er sera einføld. Tað einasta arbeiðsgevarin skal gera, er at senda eina leinkju, har víst verður hvar lýsingin er. Síðan tekur Yrkistænastan sær av at senda lýsingina víðari út allastaðni, har viðkomandi føroyingar eru.

#### Øll kunnu vera við

Øll lesandi, sum hava krossað av, at tey ynskja at vera við í skipanini, kunnu vera við. Einki mark er fyri, hvat tú skalt lesa, hvar tú skalt lesa, ella hvussu langt tú skalt vera komin við útbúgvingini. Stuðulsstovnurin hevur bjóðað øllum, sum eru undir útbúgving og sum fáa stuðul, at vera við í skipanini. Tey, sum hava krossað av, at tey vilja hava starvslýsingarnar sendandi á sína privatu t-postadressu, fáa tilboðið. Sí leinkju undir umsóknarblað 2010 á www.studul.fo

Skipanin fevnir sostatt um tey, sum eru undir útbúgving í Føroyum og eisini um tey, sum eru undir útbúgving uttanlands. Hetta merkir, at øll føroysk lesandi kunnu fáa starvslýsingar, óansæð hvar í heiminum tey nema sær útbúgving. Talan er um allar útbúgvingar, sum eru eftir miðnám. Um tú hevur krossað av á umsóknarblaðnum, ert tú tilmeldaður, og so fært tú viðkomandi lýsingar sendandi.



*Yrkistænastan hjálpir føroyskum lesandi at frætta um leys størv í Føroyum. Tað kann bøta um arbeiðsloysið hjá nýútbúnum*

## 5 góð ráð til nýútbúnar arbeiðsloysingar

**1. Søk breitt**

Ger upp við teg sjálvan, hvat tú vilt, og søk tey størv, sum líkjast so nógv sum gjørligt. Men um títt fakøkið er meint rakt av arbeiðsloysi, kanst tú víðka leitingina. Tað er betri at nýta ein lítlan part av tíni vitan, enn at ganga arbeiðsleysur. Um ikki annað, so fært tú brúkt nakrar av tínum førleikum.

**2. Netverka**

Tað er nú, tú skalt nýta títt netverk frá skúlaarbeiðnum, undirvísingini, praktikstøðunum, sjálvbodnum arbeiði, sosialum netverkum á netinum, vinum og familju. Tað nyttar einki at seta seg inni at kúra, royn ístaðin at hitta nýggj fólk, t.d. á skeiðum ella eftirútbúgvingum. Kanska kunnu tit hjálpa hvørjum øðrum víðari.

**3. Vís hvat tú veist**

Far til tey støðini, har fólk í tínum yrki hittast. Frættir tú um eitt skeið ella eina konferansu, kanst tú bjóða teg fram at halda ein fyrilestur ella eitt upplegg um títt serøki. Ger tær dælt av, at tú hevur eina servitan innan eitt ávíst øki, og lat onnur síggja tíni evni.

**4. Tak tað ikki persónligt**

Tú ert bara óheppin at vera útbúgvin júst nú, ið arbeiðsloysið er høgt. Tað er ikki tín ábyrgd ella skyld, at tú ikki fært arbeiði. Lat tí vera við at taka tað persónligt og fella í fátt.

**5. Søk málrættað**

Bæði umsókn og cv skulu verða sera málrættað, tá tú søkir starv. Tað nyttar einki at hava eina standard umsókn, sum tú bara sendir út til øll. Ger tær ómak og vís á tínar dygdir. Søkir tú starv innan alnetið, ger so eina heimasíðu og vís á hana í umsóknini. Ynskir tú at skriva, ger so ein blogg og blanda teg í almenna kjakið við skrivligum innleggum í bløðunum.